ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Øll toppliðini taptu

3. deild: Hóast teir í 2. hálvleiki bara spældu við tíggju monnum, so megnaðu niðurflytingarhóttu fuglfirðingarnir at vinna á oddaliðnum av Skála

Tí at tað, sum vendir niður, vendir upp, plagar at vera at hoyra. Vendingin kann væl brúkast um úrslitini í 3. deild í 14. umfarinum. Í síðstu viku søgdu vit, at nógv bendi á, at Skáli fór at vinna deildina. Møguleikin er framvegis stórur fyri hesum. Oddasessurin hjá skálamonnum er eins tryggur nú, sum hann var undan vikuskiftinum. Men tað er hann ikki, tí teir á oddaliðnum gjørdu so nógv um seg hesa ferð.

Skáli tapti í Fuglafirði móti botnliðnum, men oddasessurin er eins tryggur hjá skálamonnum, tí tey bæði næstu liðini, sum áður hava verið oddalið, og sum liggja framvið at vinna deildina, taptu eisini. AB tapti torføra útidystin í Vági, meðan tað var meiri óvæntað, at B36 skuldi tapa á heimavølli móti B71. Harvið vóru sandoyingar so ófólkaligir, at teir fóru suður aftur um Skopunarfjørð við øllum stigunum – bæði í 1. deild og í 3. deild.

Komandi vikuskifti eigur Skáli torføran útidyst á Sandi. Vit hava fyrr nevnt, at alt bendi á, at tey trý liðini, sum framvegis eru ovast á støðutalvuni, fóru at vinna heiðursmerkir. Tað eru framvegis líkindi fyri hesum, men nú blanda sandoyingar seg uppí av álvara.

AB skal enn eina ferð um Suðuroyarfjørð, og B36 fær vitjan av VB, sum ikki plagar at standa seg so væl á útivølli, sum teir hava staðið seg á heimavølli. Úrslitini hjá B36 seinastu tíðina boða kortini frá, at teir ikki hava sama flogið.

Spurningurin um beinleiðis niðurflyting kemur ivaleyst nærri einum svari, tá KÍ hevur verið í Vágum, og ÍF hevur verið á grasliknum á Svangaskarði. FS Vágar taptu á heimavølli móti TB, og harvið eru vágamenn eisini í niðurflytingarvanda í 3. deild.

FS Vágar–TB

Gongdin hjá heimaliðnum í Miðvági var akkurá tann sama sum tann hjá Liverpool og Manchester United síðsta vikuskifti. Tá teir tríggjar minuttir eftir steðgin við beinleiðis frísparki øktu til 3–0, tóktist alt avgjørt, men soleiðis gekk tað ikki.

Tvørámenn hildu seg mótsatt heimaliðnum at hava havt vánaliga úrtøku burturúr møguleikunum í 1. hálvleiki. Beint eftir 3–0 málið eydnaðist tað hjá Andras Noelse, og so vunnu teir. Spælandi venjarin, Lynge Nielsen, skoraði eitt, og Hallur Christiansen, sum fyrsta partin av kappingarárinum var í álopinum í 2. deild, men sum hevur verið skaddur, skoraði tvey. Sigursmálið skoraði hann, tá fimm minuttir vóru eftir. Tá vóru teir á heimaliðnum bara tíggju.

B68–KÍ

Bæði liðini eru í so nær botninum. Klaksvíkingar vóru so mikið illa mannaðir, at venjarin, Bill Jacobsen var einasti maður á beinkinum. Hann kom inn, tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Beint frammanundan hevði Aksel Højgaard á heimaliðnum javnað til 2–2

Mannbjørn Nesá, sum fleiri ferðir hevur verið á besta liðnum, setti hol á. Helmar Lassen, sum fyrr í summar skoraði fleiri mál í 2. deild, javnaði fyri KÍ seks minuttir fyri steðgin, og seks minuttir eftir steðgin legði Allan Poulsen KÍ á odda.

B36–B71

Ein tann minnisríkasti dysturin hjá sandoyingum nakrantíð man vera, tá teir í 1989, tá teir vunnu FM, vunnu 2–0 á B36 í Gundadali. Tað verður ofta tikið til tann dystin. Ellivu ár er long tíð í fótbólti. Burtursæð frá Eli Hentze var eingin av FM vinnarunum á besta sandoyar liðnum sunnudagin. Men á næstbesta liðnum hjálptu tríggir til – Ib Mohr Olsen, Páll á Reynatúgvu og Torbjørn Jensen. Millum hinar var Alex Nielsen, sum í 1. deildardystinum sat á beinkinum alla tíðina.

Hjá B36 var Bjarni Prior, sum hevur verið skaddur leingi, í álopinum.

Fyrra umfarið fingu liðini hvør sítt mál. Antines Magnussen, sum bara spældi 1. hálvleik, legði tíðliga B71 framum, og stutt undan hvíldini javnaði Bjarni Prior.

Alex Nielsen fekk sigursmálið, tá tað restaðu fýra minuttir. Tá vóru heimamenninir bara tíggju, tí Allan Manai varð rikin av vøllinum, tá tjúgu minuttir vóru eftir.

ÍF–Skáli

Fuglfirðingar eru av álvara farnir undir bjargingarroyndina. Hesa ferð var bitin stórur. Oddaliðið av Skála var greiður favorittur, men tað, sum teir ikki megnaðu í 2. deild, tað megnaðu teir næstbestu í Fuglafirði.

Bogi Lervig hevði sett seg sjálvan á liði saman við Ólavi Ellingsgaard og Bárði Mortensen, sum ikki hevur spælt nakað serligt í ár.

Tað eydnaðist at basa gestunum av Skála, sjálvt um ÍF so at siga allan 2. hálvleiki spældi við tíggju monnum. Jákup Baldvinsson fekk tvey gul kort tíðliga í 2. hálvleiki. Men sum tað so ofta hevur víst seg áður, so var tað eisini hesa ferð. ÍF spílaði seg av álvara út í 2. hálvleiki. Kaysten Rasmussen javnaði til 2–2 beinleiðis uppá fríspark, tá seinna umfarið var eitt korter gamalt, men ÍF svaraði væl og virðiliga aftur, og nú er bjargingin ikki púra ómøgulig.

VB–AB

Aftur eitt vónbrot hjá argjamonnum, sum sakna málverjan Jóhan Stenberg. Hann hevur brotið hondina og verður neyvan við aftur í ár. Útispælarar skiftast um at verja málið, og tð kostar eitt mál nú og eitt annað tá.

Eftir stórt verjukiks legði toppskjúttin í deildini, Svend Poulsen, AB framum. Gestirnir høvdu møguleikar at økja um leiðsluna, men teir komu ikki nærri enn at raka stólpa og tvørtræ.

Í 2. hálvleiki leikaði javnt á, og tá fingu vágbingar stóra úrtøku. Undan hvíldini javnaði Petur Óli Samuelsen, sum undan summarsteðginum fleiri ferðir var á besta VB liðnum. Hann hevur verið burturstaddur. Egil Steintórsson, sum hevur verið í Íslandi í summarfrí, var við aftur og legði VB framum, og við einum rimmar langskoti staðfesti stórskjúttin frá 13. umfarinum, Per Joensen, heimasigurin.

JH

14. umfar

FS Vágar–TB 3–4 (2–0)
1–0: Petur Niclassen 30.
2–0: Magnus Simonsen 41.
3–0: Magnus Simonsen 48.
3–1: Andras Nolsøe 51.
3–2: Hallur Christiansen 62.
3–3: Lynge Nielsen 70.
3–4: Hallur Christiansen 85.

Reytt kort: Bárður Joensen, FSV, 75.

B68–KÍ 2–2 (1–1)
1–0: Mannbjørn Nesá 13.
1–1: Helmar Lassen 39.
1–2: Allan Poulsen 51.
2–2: Aksel Højgaard 55.

B36–B71 1–2 (1–1)
0–1: Antines Magnussen 8.
1–1: Bjarni Prior 39.
1–2: Alex Nielsen 86.

Reytt kort: Allan Manai, B36, 70.

ÍF–Skáli 4–2 (2–1)
1–0: Jákup Baldvinsson 11.
1–1: Janus Trúgvason 37.
2–1: Bogi Lervig 43.
2–2: Kaysten Rasmussen 60.
3–2: Martin Hansen 65.
4–2: Ken Bærendsen br 90

Reytt kort: Jákup Baldvinsson, ÍF, 55.

VB–AB 3–1 (1–1)
0–1: Svend Poulsen
1–1: Petur Óli Samuelsen
2–1: Egil Steintórsson
3–1: Per Joensen

15, umfar

2. september
FS Vágar–KÍ
B68–ÍF
B36–VB
TB–AB
B71–Skáli

Máltindurin

Svend Poulsen	AB	18
Kristoffur Vidtfeldt	B71	15
Aksel Højgaard	B68	12
Pauli Hansen	Skála	12
Signar Johannesen	AB	11
Petur Niclasen	FS Vágar	11
Egill Steintórsson	VB	10
Oddbjørn Joensen	AB	9
Per Joensen	VB	9
Regin Arge	B36	8
Kaj Roest	TB	8
Magnus Simonsen	FS Vágar	7
Hans Christian Djurhuus	Skála	7
Hallur Christiansen	TB	7
Jákup Olsen	B68	6
Jákup Baldvinsson	ÍF	6
Kaysten Rasmussen	Skála	6
Marius Joensen	Skála	6
Kári í Lágabø	VB	6
Páll á Reynatúgvu	B71	5
Jógvan Arnfinn Jacobsen	ÍF	5
Aksel Johannesen	KÍ	5
Eyðun Svalbard	TB	5
Fróði Stenberg	AB	4
Dánial Petur Johansen	B36	4
Tumas Eli Hansen	B36	4
Eirikur Poulsen	B71	4
Jónsvein Thomsen	B71	4
Sjálvmál	B71	4
Ken Bærendsen	ÍF	4
Bárður Andreasen	KÍ	4
Leon Bjartalíð	KÍ	4
Jón Rasmussen	Skála	4
Jóhannes Johannesen	TB	4
Just Johannesen	TB	4

Støðan, 3. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Skála	14	9	-	1	-	4	54	30	24	28
2	AB	14	9	-	0	-	5	66	34	32	27
3	B36	14	9	-	0	-	5	41	19	22	27
4	B71	14	8	-	0	-	6	49	39	10	24
5	VB	14	8	-	0	-	6	41	40	1	24
6	TB	14	6	-	2	-	6	43	40	3	20
7	B68	14	4	-	4	-	6	36	36	0	16
8	FS Vágar	14	4	-	2	-	8	37	54	-17	14
9	KÍ	14	4	-	1	-	9	36	96	-60	13
10	ÍF	14	4	-	0	-	10	35	50	-15	12

Vegna vaksandi virksemi **søkja vit eftir tveimum fólkum** at byrja skjótast tilber

Web Design

Ert tú teldufreak og dugir at gera heimasíður og líknandi uppgávur, so er hetta kanska nakað fyri teg. Vit sóknast eftir einum fólki, ið veit hvat html-forritan er og hvat Flash, GoLive og onnur líknandi forrit kunnu brúkast til. Tú kennir møguleikarnar við internetinum og kundi hugsað tær at arbeitt í einum virki við nógvum spennandi og fjølbroyttum uppgávum. Tú hevur gott hugflog, góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt.

Grafiskt hjálparfólk

Tað er framvegis eingin treyt, at tú eitur Petur, men tú mást duga nøkulunda tað sama sum vit; at halda í músini, Photoshop, Quark, Freehand ella Illustrator. Tú situr kanska dagliga og arbeiðir við hesum forritum, men vilt hava nýggjar avbjóðingar og royna eitt nýtt umhvørvi. Tú hevur gott hugflog, góð samstarvsevni og vilt sleppa at arbeiða í einum virki við nógvum spennandi og fjølbroyttum uppgávum. Tað ger einki, um tú ert grafikari ella hevur liknandi royndir.

Løn og treytir

Hevur tú hug at at gerast okkara grafiska hjálparfólk ella okkara webdesignari so skriva nøkur orð um teg sjálvan, hvat tú dugir og hevur hug at arbeiða við. Løn og aðrar treytir eftir nærri avtalu. Tú kanst eisini fáa meira at vita um størvini við at ringja til okkara og spyrja eftir Petur. Umsóknir skulu vera okkum í hendi **innan 8. september 2000.**

petur@petur
R E K L A M U V I R K I
Jónas Broncksgøta 33 • Postboks 1012 • 110 Tórshavn
Tel 320 870 • Fax 320 871 • petur@petur.fo • www.petur.fo

P/F Petur & Petur byrjaði reklamuvirksemi tann 1. mars 1999 og ger í dag marknaðarføringsuppgávur fyri bæði stórar og smáar fyritøkur í Føroyum. Hjá Petur & Petur starvast trý fólk: Petur, Petur og Armgarð umframt Inga í bókhaldinum. Felagið er júst flutt í nýggj heli í Jónas Broncksgøtu 33.

Handverkaraeftirútbúgving
fyri
Elektrikarar og El innstallatørar og onnur áhugað

Treytað av nóg stórari undirtøku, verða hesi skeið hildin:

2 x 1 dag Grundskeið i IHC-programmering (í Windows versión)

18. ella 19. september 2000 (7 TÍMAR)

Arbeitt verður við:
Offline programmering
Offline redigering av verandi IHC
Visual programmering
Simulering av programminum
Dokumentation
Einføld funktiónslink – »drag and drop«
Liðugtgjørdir funktiónsblokkar

Luttakaragjald: kr. 700,00

Tilmelding: **áðrenn 12. september 2000**

Luttakarar við sveinabrævi innanfyri elfakið kunnu fáa helmingin í studningi frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin „VITAN“, kunnu søkja um stuðul haðani. Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Mikudagin 20. september verða kunningarfundir hildnir saman við LK A/S kl. 9.00 og kl. 14.00. Boðast skal frá luttøku, sum er ókeypis, á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf 311957
(mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75, Boks 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621

Fólk søkist

Fólk søkist til skósmiðjuna í SMS at arbeiða seinnapartar frá kl. 13.00-17.30 mánadag til fríggjadag.

Løn sambært avtalu.

Send eina skrivliga umsókn innan týsdagin 12.09.00.

Eisini ber til at ringja í skósmiðjuna tel. 315141 at frætta meira um starvið.

Skósmiðjan í SMS
Postboks 3166 • 110 Tórshavn • Tel. 31 51 41

Útróðrarbáturin
M/B Havfarið til sølu.
Tlf. 457735 ella **220086**

zarepta

Frá Zarepta

Kvinnustevna verður í døgunum 22.09.–24.09.2000.

Evnið á stevnuni verður: Gud gevur okkum styrki, vísir okkum álit og Hann setur okkum í tænastu.

Allar kvinnur eru vælkomnar.

Tekning í Zarepta tlf. 332140, fax 333141 ella á tlf. 283776.

Stillads Forskalling



Er ætlan at keypa ella leiga:
• Forskalling og tilhoyr
• Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.
• Facadestillads
• Trygdarrækverk
• Aluminium rullustillads
• Arbeiðsplatformar

Leverandørurin til Føroysk byggivirkir í 28 ár

THYSSENKRUPP -HÜNNEBECK

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311800

Lýsið í **sosialinum**